# Gomlu trøini fella

**Í gjár varð tað trið-síðsta av royntrøunum, sum stóðu fram við Havnará aftan fyri sparikassagarðin, felt. Røturnar standa undir í vatni, og trøini doyggja spakuliga**

GOMUL TRØ
*Eirikur Lindenskov*

Tað fellir mongum fyri bróstið at síggja menn fella gomul trø – soleiðis var eisini gjáramorgunin, tá menn feldu eitt av gomlu royntrøunum millum Sparikassagarðin og Telefonverkið í Havn.

Seinastu árini er nógv av gomlu trøunum, sum stóðu fram við Havnará frá Tinghúsvøllinum niðan móti Ebenezer, feld. Fleiri fóru í ódnini í 1988, og í dag standa bert tvey av teimum eftir, og tey standa beint aftan fyri kioskina hjá Astu.

Michael Jacobæus hjá býargartnaranum í Havn sigur, at hesi trøini ikki hava tað so gott. Tá Havnará varð løgd undir heilt, varð stoyptur kassi oman á ánna. Hetta hevur við sær, at røturnar til trøini standa undir vatni. Tískil eru røturnar rotnaðar, og trøini doyggja spakuliga.



*Í gjár varð hetta royntræið felt. Tað stendur í vegin fyri útbygginginihjá løgtinginum*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Michael Jacobæus, gartnari hjá býráðnum í Havn. Stóra ahorntræi í gongubreytini hinumegin hevur tað gott, men tey bæði roynitrøini aftan fyri kioskina fara skjótt…*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Gjøgnum árini eru nógv trø feld í miðbýnum í Havn. Michael Jacobæus sigur, at vit mugu sláa okkum til tols við, at hetta er verðins gongd. Summi trø klára seg betur enn onnur, men vit mugu bara royna at planta nýtt so hvørt – tí eitt er vist, at trøini eisini hava sína tíð.

Hann vísir á, at stóru ahorntrøini, sum standa framman fyri Gamla Bókhandil er um 150 ár.

– Aðrastaðni vita vit, at ahorntrø gerast upp til 600 ára gomul, men hvussu tað er í Føroyum, vita vit av góðum grundum ikki, sigur hann. Býargartnarin hevur annars fleiri ferðir tikið av trøunum við Bókahandilin, so krúnan ikki gerst ov høg, og hetta hjálpir væl, sigur Michael Jacobæus.

Hóast ahrontrøini miðbýnum ikki hava tær bestu liviumstøðurnar, so klára tey seg eftir umstøðunum væl. Michael Jacobæus vísir á, at tey trøini sum standa í urtagørðum – ella tey, sum fáa frið, klára seg betur. Men býargartnarin hevur plantað fleiri stór ahorntrø, sum eru um seks metur høg – í gamla Kommunuskúlagarðinum og í Gongugøtuni. Hesi klára seg væl, og av tí at tey eru so stór, so klára ótangar ikki eins væl at bróta tey.

Stóra træið, sum stendur framman fyri trappuna hjá Ebenezer, varð tikið úr viðarlundini fyri eini 15 árum síðani. Tað var tikið upp við rót saman við einum rúmmetri av mold eina náttina, og plantað framman fyri Ebenezer – og tað klárar seg væl, sigur Michael Jacobæus, sum leggur afturat, at býargartnarin sjálvandi heldur eyga við trøunum og roynir at planta nýtt innímillum, so tað ikki verður so tómligt, tá stóru trøini fara.

# Filosoferar um lív og eksitens

**Ein samd nevnd gjørdi av at lata Edwardi Fuglø norðurlendsku barnabókavirðislønina**

BARNABÓKA-VIRÐISLØN
*Eirikur Lindenskov*




*»Veingjaða myrkrið« er ein av bókunum, har Edward Fuglø hevur gjørt tekningarnar, hann nú verður heiðraður fyri. Í november fær hann norðurlendsku barnabókavirðislønina, sum er eitt heiðursbræv og eitt listarverk*

– Tað var ein samd nevnd, sum lat Edwardi Fuglø Norðurlendsku Barnabókavirðislønina fyri ár 2001. Hetta sigur norðurlendska Skúlabókavarðafelagið í tíðindaskrivi, nú tað verður almannakunngjørt, sum Sosialurin skrivaði fyri tveimum vikum síðani, at føroyski myndlistamaðurin fær virðislønina. Talan er um somu virðisløn, sum varð heiðrað Ólavi Michelsen, sála, í 1991 fyri »Rossini í Skoradali«.

Norðurlendska barnabókavirðislønin hevur verið latin av Norðurlendska Skúlabókavarðafelagnum síðani 1985. Lønin er eitt diplom og eitt listarverk og verður latin á »BogForum« í Keypmannahavn 17. november.

Edward Fuglø fær lønina fyri illustratiónirnar í bókunum »Bókstavirnir« 1995, »Villini súgdjór í Útnorði« (1999), »Veingjaða myrkrið« (2000) og »Vinmenn« (2001).

Í grundgevingunum sigur nevndin:

»Bókstavirnir er bók við teksti hjá Sigurði Joensen. Tekningarnar eru sterkar og originalar, næstan hóttandi, men hava góðar smálutir. Bókstavirnir koma fram sum persónar í einum sjónleiki, sum eru í kjaki hvør við annan, og á hvørjari síðu verður borið fram undir, hvør næsti stavur verður.«

Um »Villini súgdjór í Útnorði« verður sagt:

»Villini súgdjór í Útnorði«: Tekstin hevur Jenny Lydersen skrivað. Ein einastandandi listarlig fakbók um villu súgdjórini í Norðuratlantshavi. Myndirnar vísa ikki einans leitanina hjá djórunum eftir føði og ansni fyri ungunum, men eisini hóttandi vanda, sum eru krógvaðir í umhvørvi teirra«.

Um »Veingjaða myrkrið« verður sagt:

»Tekstin hevur William Heinesen skrivað. Edward Fuglø tók sjálvur stig til at geva út hesa søguna úr gomlu Havnini, har nógvar av søgunum hjá Williami Heinesen fara fram. Tvey børn eru á veg út úr býnum. Tann mildi augustseinnaparturin er ikki so ósekur meira, so hvørt ljósið hvørvir, og hóttandi verur koma til sjóndar. Heimurin broytist. Edward Fuglø er dugir óføra væl at gera skapilsi, fanga huglagið og alt tað, sum trínir fram í barnasinni.«

Um »Vinmenn« sigur nevndin:

»Vinmenn er eitt kvæði, sum er gjørt eftir Føroyingasøgu. Bókin vísir ávirkan kvaðanna á føroyska mentanarheimin. Tekningarnar hjá Edwardi Fuglø eru fyltar við huglag og hóska væl til evnið, og við vøkrum myndum ger listarmaðurin kvaðini meira tilgongilig fyri børn.«

Víðari sigur dómsnevndin, at verkini hjá Edwardi Fuglø vísa stóra listarliga potentiali hansara.

– Hann er úr Klaksvík, hevur lisið við Skolen for Brugskunst í Keypmannahavn frá 1987-1991 og hevur arbeitt innan sjónleik, film og sjónvarp í Danmark, Íslandi og í Føroyum, hann hevur teknað bøkur og gjørt plakatir og postkort.

Ein onnur síða av fjølbroytta virksemi hansara er málingin. Í einum nyrealistiskum, sensurrealistiskum stíli við duldum yvirtónum verður filosoferað um lív og eksitens, sigur nevndin, sum hevur latið honum heiðurin.

Edward Fuglø hevur havt framsýningar í Birkerød (1985), Smiðjuni í Lítluvík (1990), Norðurlandahúsinum (1999), Norðurlandahúsinum í Reykjavík (2000), Listaskálanum í Havn (2000) og Steiningeslott Kulturcenter, Svøríki (2001).

Í 1995 fekk Edward Fuglø Barnabókavirðirsløn Tórshavnar Býráðs.

Í dómsnevndini sótu:
anna-Lena Lindekvist, Svøríki
Bent Rasmussen, Danmark
Frida S. Haraldsdóttir, Íslandi (formaður)
Gunnvør Joensen, Føroyar
Margareta Rosenberg, Finnland
Ragnhild Mydland, Noreg



# Sunnudagsfundurin er lógarfestur

**Tingfundurin ólavsøkudag skal haldast, sjálvt um ólavsøkudagur fellur á ein sunnudag. Hetta er lógarfest í nýggju stýrisskipanini frá 1995**

TINGFUNDUR
*John Johannessen*

Tingformaðurin er noyddur at seta ólavsøkutingið sunnudagin 29. juli í ár, og tingfólk hava skyldu at møta, eins og vanligt.

Tað er nevniliga í nýggju stýrisskipanini lógarfest, at tingið verður sett ólavsøkudag, sjálvt um hesin fellur á ein sunnudag.

Tí hevur Finnbogi Ísakson, løgtingsformaður, ongan møguleika at taka til eftirtektar mótmælið frá Hendriki Old og skrivligu áheitanina frá Fólkaflokkinum um at flyta tingfundin til mánadagin eftir ólavsøkudag.

## Ópolitiskur fundur

Í sambandi við arbeiðið at gera nýggju stýrisskipanina var nógv orðaskifti í nevnini, ið arbeiddi við hesum, hvørt haldast skuldi fram við gomlu regluni, um at ólavsøkufundurin skuldi flytast til mánadag, um ólavsøkudagur fall á ein sunnudag.

Men nevnin kom til ta niðurstøðu, »at tað ikki kann haldast at ganga ímóti kristna grundarlag føroyinga at halda henda serliga hátíðarliga tingfund sunnudag, vegna tess, at gudstænasta verður hildin fyrst og einki politiskt kjak fer fram henda dag, men bert løgmansrøðan um støðu landsins verður hildin«.

Nevnin gjørdi sostatt av at strika ásetingina í gomlu tingskipanini, ið segði, at fundurin skuldi setast dagin eftir, um ólavsøkudagur var sunnudag.

## Eingi fundarboð

Í nýggju tingskipanini í nýggju stýrisskipanarlógini er greitt ásett við lóg, at tingfundur skal haldast klokkan 13 ólavsøkudag, har tingið verður sett og løgmaður heldur ólavsøkurøðu sína. Eisini er skrúðgongan lógarfest.

Tí er ikki so mikið sum neyðugt hjá tingformanninum at senda fundarboð út til fundin. Fundurin er ásettur við lóg, og skal tí haldast, líkamikið, hvat tingformaðurin ella aðrir tinglimir halda. Hetta er eisini greitt staðfest í viðmerkingunum til tingskipanina.



*Løgtingsformaðurin hevur ongan møguleika at bíða við at seta tingið til mánadagin eftir ólavsøku, ein og tingfólk ynskja. Fundurin ólavsøkudag er lógarfestur*

Finnbogi Ísakson, tingformaður:

## – Eg havi einki val

TINGFUNDUR
*John Johannessen*

– Tað er ikki eitt prinsipp fyri meg, at tingfundurin á ólavsøku skal haldast sunnudag. Men eg havi onga heimild at flyta hann.

Hetta sigur Finnbogi Ísakson, tingformaður, í sambandi við, at tingfólk hava mótmælt, at ólavsøkutingfundurin í ár verður settur sunnudag.

– Um eg hevði heimild at flyta fundin, skuldi eg fegin gjørt tað, men tað havi eg ikki, tí fundurin er lógarfestur, sigur Finnbogi Ísakson í stuttari viðmerking.

# Fólkaflokkurin vil flyta ólavsøkufund

**Tað er ikki góður siður at byrja ella gera arbeiði ein sunnudag. Hetta heldur Fólkaflokkurin, sum hevur sent formansskapinum í løgtinginum bræv við áheitan um, at flyta setanina av løgtinginum til mánadagin eftir ólavsøku**

TINGFUNDUR
*John Johannessen*



*Óli Breckmann, formaður Fólkafloksins, hevur sent formansskapi løgtingsins skrivliga áheitan um at flyta tingsetanina og ólavsøkurøðuna í ár til mánadagin eftir ólavsøku. Orsøkin er, at ólavsøkudagur í ár fellur á ein sunnudag*

Fólkaflokkurin hevur sent formansskapi løgtingsins skrivliga áheitan um at flyta setanina av løgtinginum og ólavsøkurøðuna í ár til mánadagin eftir ólavsøku.

Orsøkin er tann, at ólavsøkudagur í ár fellur á ein sunnudag, og ikki hevur verið vanligt, at tingið kemur saman sunnudag.

Fólkaflokkurin viðgjørdi málið á fundi týsdagin, og samdist um at senda formansskapinum skrivliga áheitan um at flyta fundin.

## Gamal siður

»Ólavsøkudagur í ár fellur á ein sunnudag, og tað hevur í Føroyum ikki verið hildin at vera góður siður at byrja ella gera arbeiði ein halgidag«, skrivar Fólkaflokkurin millum annað í stutta brævinum til formansskapin í løgtinginum.

Í brævinum vísir Fólkaflokkurin eisini á, at setanin og ólavsøkurøðan áður eru flutt til mánadagin eftir ólavsøku, tá ólavsøkudagur hevur verið sunnudag.

Tað er løgmaður, ið skal halda ólavsøkurøðuna. Og Anfinn Kallsberg, løgmaður, er limir í Fólkaflokkinum.

Men Óli Breckmann, formaður Fólkafloksins sigur, at avgerðin um at heita á formansskapin um at útseta røðuna er tikin í fullum samráð við løgmann.

– Eg tosaði við løgmann, áðrenn eg skrivaði brævið til formansskapin, og vit vóru samdir um, at tað var rætt at senda áheitanina avstað, sigur Óli Breckmann, formaður Fólkafloksins.

## Noktar at møta

Tað er ikki bara Fólkaflokkurin, ið er ímóti, at ólavsøkutingið í ár verður sett sunnudag. Í Sosialinum í gjár var samrøða við Hendrik Old úr Javnaðarflokkinum, sum segði seg hvørki fara at møta til tingfundin ella skrúðgonguna á ólavsøku, orsakað av, at formansskapurin hevði gjørt av at byrja arbeiðsárið sunnudag.

Í Sambandsflokkinum og Miðflokkinum eru eisini fólk, ið eru ímóti at møta í løgtinginum sunnudag. Alfred Olsen, tingmaður fyri Sambandsflokkin segði við Sosialin í gjár, at hann onga meingin sá í at seta tingið ein sunnudag, og at flokkurin fór at taka hetta upp á fundi. Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, segði seg fara at heita á tingformannin um at flyta fundin til mánadagin eftir ólavsøku.

